# Fríhavnir

## Frágreiðing um møguleikar fyri at seta fríhavnir á stovn í Føroyum

**Í nevndini hava verið:**
Tórbjørn Mikkelsen
Jóngerð Purkhús
Árni Joensen
Heini Fosaa
Finnbogi Niclasen
Marjun R. Simonsen, skrivari

23. februar 1995

**Innleiðing** .......... síða 1

**1. Fríhavnir** .......... síða 2
1.1. Hvussu fríhavnir skulu rekast .......... síða 2
1.2. Starvsháttur hjá fríhavnum .......... síða 2
1.3. Treytir fyri at reka vinnuvirki í fríhavn .......... síða 3
1.4. Starvsháttur hjá goymslu í fríhavn .......... síða 4
1.5. Goymsluroknskapurin .......... síða 4
1.6. Tilflutningur av vørum .......... síða 5
1.7. Fráflutningur av vørum .......... síða 5

**2. Alternativ til fríhavnir: Frígoymslur** .......... síða 6
2.1. Treytir fyri frígoymslur fyri almenningin .......... síða 6
2.2. Mannagongd fyri frígoymslur fyri almenningin .......... síða 7
2.3. Góðsking av vørum - framleiðsluvirkir .......... síða 7
2.3.1. Fyribils fráseting (suspensión) .......... síða 8

**3. Lógarreglur / skrivligar vegleiðingar** .......... síða 9
3.1. Lógir .......... síða 9
3.2. Skrivligar vegleiðingar .......... síða 9

**4. Yvirlit yvir íløgur** .......... síða 11

**5. Niðurstøða** .......... síða 12
5.1. Verandi vinna .......... síða 12
5.2. Nýggjar vinnur .......... síða 13
5.2.1. Tænastu- og flutningsvinnan .......... síða 13
5.2.2. Havnaverkini .......... síða 14
5.2.3. Umskipan av fiski .......... síða 14
5.3. Handilsdepil .......... síða 15
5.4. Annað virksemi í fríhavn - oljuvinna .......... síða 15

**Fylgiskjal**
Arbeiðssetningur hjá nevndini

# Innleiðing

Henda frágreiðing er gjørd út frá arbeiðssetningi, sí fylgiskjal 1, sum nevndin hevur fingið frá Føroya Landsstýri.

Setningurin sigur, at møguleikar fyri at seta á stovn **fríhavn** skulu kannast, men tá ið leitað var eftir tilfari um fríhavnir fekst eisini gott útlendskt tilfar um tollpakkhús, sum eftir hetta verður nevnt frígoymsla. Út frá tí meting, at ætlanir landsstýrisins við at geva loyvi til at seta á stovn fríhavnir eru at menna vinnulívið, og fyri at so nógv sum møguligt skulu fáa gagn av tí, hevur nevndin valt at greiða frá frígoymslum eins væl og frá fríhavnum og vil eisini mæla til, at møguleiki verður at seta frígoymslur á stovn umframt fríhavnir.

Lagt verður eisini upp til at fríøki skal kunna stovnast eins væl og fríhavn, um bert fyritreytirnar eru til staðar.

Frágreiðingin miðjar ímóti at menna føroysku vinnuna, útnytta verandi íløgur betur og møguliga at skapa nýggj arbeiðspláss við at økja transithandilin og bøta um virkisumstøðurnar hjá landsins vinnulívi. Tí er gingið út frá, at kostnaðurin av at stovna og reka fríhavnir skal vera so lágur sum møguligt. Av tí orsøk verður heldur ikki nágreinað, hvussu persónar, virkir, ella stovnar, ið ætla sær at stovna fríhavn, skulu fáa fígging, og hvat viðkomandi skal taka við í sínar fyrireikandi útrokningar.

Kommunurnar eiga og reka føroysku havnirnar. Ongar broytingar eru hugsaðar á tí økinum, og nevndin hevur í síni frágreiðing gingið út frá, at annað virksemi í fríhavnunum verður rikið undir vanligum marknaðarbúskaparligum treytum, har persónar og virkir luttaka undir somu treytum, sum í dag eru galdandi á havnaøkjunum. Landið luttekur á henda hátt hvørki í rakstri ella íløgum.

Víst verður á, at einasta floghavn í landinum líkur allar tær fyritreytir, sum krevjast av eini fríhavn, so sum pakkhús, innigirt øki og atkomuvegir undir eftirliti. Í skipahavnunum verður helst neyðugt at gera ávísar smærri íløgur.

# 1. Fríhavnir

Ein fríhavn er eitt serligt havnalag ella øki. Vørur, ið eru lagdar upp í fríhavnini, verða, hvat tolli, avgjaldi, og handilspolitiskum fyriskipanum viðvíkur, mettar, sum um tær ikki vóru í føroyskum tolløki, so leingi sum vørurnar ikki eru fluttar í fría sølu í Føroyum ella tiknar í nýtslu ella brúktar í fríhavnini.

Fríhavnin er skild frá restini av føroyska tolløkinum við einari girðing. Tað skal vera møguligt at hava eftirlit við ferðsluni inn og út úr økinum. Girðingin ger at tollvaldið uttan hindur kann hava eftirlit uttan fyri og innan fyri fríhavnina/fríøki og ansa eftir, at órættligur vøruflutningur til ella frá fríhavnini ikki er møguligur. Ferðsla til og frá kann bert fara fram gjøgnum skipa- og flogferðslu og gjøgnum inn- og útgongdir, sum eru undir eftirliti.

## 1.1. Hvussu fríhavnir skulu rekast

Fríhavnir verða riknar eins og aðrar havnir við sama arbeiðsbýti millum havn og vinnu sum har.

Føroysku havnirnar eru allar kommunal ogn, og tær hava rætt til at krevja havna- og brúgvagjald frá teimum skipum, sum nýta havnirnar og vørugjald fyri tær vørur, ið verða inn- og avskipaðar.

Gjøldini eru tey somu fyri allar havnirnar og verða ásett av landsfyrisitingini.

Annað virksemi á havnaøkinum verður í høvuðsheitinum rikið av persónum og virkjum sum leiga øki frá havnini og í summum førum bygningar, men annars sjálvi útvega sær ta útgerð tey skulu nýta og gera íløgur í neyðug øki.

## 1.2. Starvsháttur hjá fríhavnum

Í fríhavn/fríøki eru goymslur, ið virka sum goymslustað fyri útlendskar vørur. Føroyskar vørur kunnu verða lagdar á goymslu, bæði tá tær eru ætlaðar til útflutnings, og tá ætlanin er seinni at flyta tær í fría sølu í Føroyum.

Í fríhavnini kann umframt goymslu av vørum vera virksemi av ídnaðarligum og handilsligum slag og tænastuveitingar, um virksemi, ið talan er um, ikki førir við sær trupulleikar við eftirliti.

## 1.3. Treytir fyri at reka vinnuvirki í fríhavn

Ein og hvør persónur og eitt og hvørt virki - eftir hetta nevnt tann vinnurekandi - sum fremur virksemi í eini fríhavn, tað veri seg goymsla, viðgerð, tilevning ella søla ella keyp av vørum, skal hava loyvi frá tollvaldinum.

Tollvaldið skrásetur vinnurekandi, ið hava goymslur til vørur í fríhavnini. Hesi vinnurekandi fáa frá tollvaldinum eftir umsókn og eftir ávísum treytum skrivliga góðkenning, har vøruflutningurin og virksemið, ið er góðkent fyri viðkomandi vinnurekandi, er tilskilað.

Tollvaldið kann nokta vinnurekandi atgongd til at fremja virksemi í eini fríhavn, tá ið viðkomandi vinnurekandi ikki kann vísa á neyðuga trygd fyri, at tollreglur v.m. verða hildnar.

Vinnurekandi skulu føra goymsluroknskap, ið skal kunna góðkennast av tollvaldinum. Allar vørutransaktiónir skulu bókast í roknskapinum. Roknskapurin skal gera tollvaldið ført fyri at kenna vørurnar aftur og vísa vøruflutning og tryggja, at tollreglur verða hildnar.

Tann vinnurekandi skal boða tollvaldinum frá einum og hvørjum tilburði, har vørur verða burtur, sum ikki kann sigast at vera av náttúrligum orsøkum.

Tann vinnurekandi heftir fyri vørur, sum ikki eru at finna á goymsluni, tá tollvaldið kemur á eftirlit, og sum ikki sambært roknskapinum og tilhoyrandi fylgiskjølum/skjalprógvum eru skrásettar at vera fráfluttar, tileinkigjørdar ella at vera mistar, so tær ikki kunnu fáast aftur, í samsvari við galdandi reglur.

Vørur eiga at kunna verða goymdar í fríhavn uttan tíðaravmarking.

Skilt verður ímillum goymslur fyri almenningin og privatar goymslur í fríhavnini.

Goymslur fyri almenningin eru goymslur, sum persónur ella virki eigur, har øll kunnu leggja vørur, meðan ein privat goymsla er goymsla, sum ein persónur ella eitt virki eigur til at leggja sínar egnu vørur á. Vørurnar eru í báðum førum frítiknar fyri toll, punktgjald og mvg v.m.

## 1.4. Starvsháttur hjá goymslu í fríhavn

Í fríhavnini skal í minsta lagi vera ein goymsla fyri almenningin og síðani privatar goymslur eftir tørvi. Privatar goymslur kunnu fyri ein part vera

goymslur hjá speditørum, sum goyma vørur, ið eru ætlaðar øðrum virkjum, og fyri ein part vera goymslur hjá virkjum, ið goyma egnar vørur.

Allar vørur kunnu setast í fríhavnina hóast slag, mongd, uppruna ella ætlan við vørunum. Undantikið hesum eru tó vørur, ið eru umfataðar av forboðum og avmarkingum, sum eru grundaði á almenna siðvenju, rættlag og trygd, á at verja lív og heilsu hjá menniskjum og dýrum, verja plantur, tjóðskaparligar dýrgripir av listaligum, søluligum ella jarðfrøðiligum virði og at verja ídnaðarligan ella handilsligan ognarrætt.

Útlendskar vørur, ið eru settar á goymslu í fríhavn, kunnu, meðan tær eru í fríhavnini:

- verða fluttar í fría sølu móti tolling,

- uttan serligt loyvi viðgerast á teir hættir, ið eru vanligir fyri vørur á frígoymslu, tað er: at tryggja, at vørurnar verða varðveittar, at bøta um útsjóndina ella handilsligu góðskuna, og at fyrireika útbering ella víðari sølu,

- uttan serligt loyvi flytast til góðskingar ella tilevningar á góðkendum virkjum, ella

- verða tileinkigjørdar undir eftirliti tollvaldsins.

Útlendskar vørur mugu ikki verða brúktar í fríhavnini, undantikið tá tær verða brúktar ella tiknar í nýtslu orsakað av omanfyri nevndu punktum.

Høgtskattaðar vørur - so sum spiritus, vín og aðrar drykkjuvørur við alkoholi og tubaksvørur og sigarettir - verða lagdar á goymslu sambært serligum reglum, m.a. serlig trygdarkrøv til hølini.

## 1.5. Goymsluroknskapurin

Í fríhavnini skulu vinnurekandi føra serligan goymsluroknskap, ið skal vera góðkendur av tollvaldinum.

Goymsluroknskapurin skal serliga innihalda hesar upplýsingar:

- upplýsingar um merki, nummar, tal og slag, vørunøgd og vørulýsing og í givnum føri eyðkennismerki á kontainara,

- neyðugar upplýsingar til at fylgja vørunum, serliga við atliti til, hvar tær seinni verða goymdar,

- ávísing til galdandi flutningsskjøl fyri tilflutning og fráflutning av vørunum, og

- upplýsingar um framdar viðgerðir.

## 1.6. Tilflutningur av vørum

Innflutningur av vørum við skipi ella loftvegis beinleiðis til fríhavn kann fara fram, uttan at vørurnar verða vístar fram fyri tollvaldinum. Kortini skal skrásetast, at vørurnar eru komnar á land og inn í fríhavnina.

At vørusendingar verða fluttar yvir land til eina fríhavn, krevur serstaka tollmannagongd, sum skal greiðast í samband við, at vørurnar koma til fríhavnina.

Allar vørur, ið verða fluttar til goymslur í eini fríhavn, skal tann vinnurekandi beinanvegin bóka í goymsluroknskapin.

## 1.7. Fráflutningur av vørum

Tá vørur verða fluttar av goymslu í fríhavn skal tann vinnurekandi beinanvegin bóka í goymsluroknskapinum, og vørurnar skulu tollast sambært galdandi reglum.

Fráflutningur av vørum til útflutnings ella endurútflutnings frá føroyskum tolløki kann fara fram, uttan at vørurnar verða bjóðaðar fram ella uppgivnar fyri tollvaldinum.

Tá útlendskar vørur verða fluttar til fría sølu, skulu tær góðsskrásetast við tí í hyggju seinni at fastleggja tollmannagongd, t.d. tolling.

# 2. Alternativ til fríhavnir: Frígoymslur

Sum alternativ til fríhavn ber til at seta á stovn frígoymslu fyri almenningin. Slíkar frígoymslur geva virkjum møguleika at leggja upp vørur frá útlondum í styttri ella longri tíð, uttan at tollur, mvg og punktgjald skal gjaldast fyri tær.

Hesar frígoymslur liggja uttan fyri fríhavnirnar, og tí kunnu bygningar, sum í dag standa tómir, verða tiknir í nýtslu.

Slíkar frígoymslur fyri almenningin eru longu í dag, tað eru tey tollpakkhúsini sum flutningsfeløgini hava; men tíðarfreistin fyri at hava vørur liggjandi ótollaðar er avmarkað, og møguleiki er ikki fyri at partklarera.

Verða frígoymslur settar á stovn, fáa virkir, ið fáa vørur heim úr útlondum, við tí í hyggju seinni at tolla ella endurútflyta tær, møguleika at hava vørurnar liggjandi á frígoymslu longri enn í dag og síðani útflyta ella tolla tær, so hvørt sum tær skulu takast í nýtslu.

Vørur, ið eru lagdar á frígoymslur fyri almenningin, kunnu bert verða lagdar undir vanliga viðgerð. Tað er viðgerð sum miðjar ímóti:

- at tryggja, at vørurnar verða varðveittar
- at bøta um útsjóndina ella handilsligu góðskuna
- at fyrireika útbering ella víðari sølu.

## 2.1. Treytir fyri frígoymslur fyri almenningin

Skotið verður upp, at tollvaldið umsitur og gevur játtanir til at reka almenna frígoymslu.

Við broyting í tolllógini, sí síðu 9 eigur at vera ásett, at frígoymslur kunnu verða settar á stovn í havnum, ið eru góðkendar uppskipingarhavnir.

Eisini eigur at verða ásett,

- at speditørar, flutningsvirkir, skipsmeklarar, havnamyndugleikar o.o., ið leggja upp vørur fyri onnur virkir, kunnu fáa loyvi til at stovna frígoymslu,

- at frígoymslur kunnu stovnast við havnirnar og floghavnina og aðrastaðni í landinum.

- at serligur tørvur skal vera á tí staðnum, sum ynski er um at stovna frígoymslu. Hetta verður helst á støðum, har góðs kemur til landið, ella á støðum, har góðs verður sent víðari ella býtt út, og

- at talan skal vera um eina ávísa støðuga góðsmongd.

Reglur og leiðbeiningar eiga at vera gjørdar um, hvørji krøv umsóknin skal lúka fyri at kunna verða játtað, og um hvussu langa tíð játtanirnar vara; hetta kann eisini ásetast í hvørjum einstøkum føri, alt eftir hvat slag av vørum, ið talan er um. Eisini eigur at vera ásett, hvussu stór trygdin fyri toll, mvg og onnur gjøld skal vera.

Harumframt mugu oyðibløð við fylgiskjølum gerast til umsókn og játtan.

## 2.2. Mannagongd fyri frígoymslur fyri almenningin

Reglur / vegleiðing

- um mannagongdir eiga at vera gjørdar um, hvussu farast skal fram, tá vørur verða lagdar á goymslu ella fluttar av frígoymslu ella fluttar millum frígoymslur, og skjøl eiga at verða gjørd til hesa nýtslu,

- eiga at verða gjørdar um mannagongd og skjøl at nýta, tá ið vørur verða fluttar av frígoymslu til tollingar.

- um mannagongd og skjøl eiga at verða gjørd at nýta, tá ið vørur verða fluttar av frígoymslu til útflutnings.

- um mannagongd og skjøl eiga at verða gjørd at nýta, tá ið vørur verða fluttar av einari frígoymslur á eina aðra frígoymslu.

## 2.3. Góðsking av vørum - framleiðsluvirkir

At geva vinnurekandi loyvi til at góðska vørur í Føroyum uttan at skula gjalda toll, mvg og punktgjald av rávørunum er eisini ein møguleiki at fremja føroysku framleiðsluvinnuna. Virkin góðsking gevur føroyskum virkjum líka góðan møguleika at útvega sær rávørur, sum virkir í øðrum londum hava.

Í nógvum øðrum londum finst meiri rávøra enn í Føroyum. Føroyingar fáa við virknari góðsking atgongd til størri úrvæl av rávøru uttan at skula gjalda toll, mvg og punktgjald. Virkini kunnu soleiðis framleiða úr bíligari rávøru og fáa bíligari lidnar vørur at flyta út.

Í Føroyum eru ikki nógvar rávørur uttan fiskur. Um loyvi verður givið at seta framleiðsluvirkir á stovn, opnar tað fyri møguleikanum at nýta aðrar rávørur.

## 2.3.1. Fyribils fráseting (suspensión)

Ein máti at skipa virkna góðsking til endurútflutning uppá er við suspensión - eftir hetta kallað fyribils fráseting.

Fyribils fráseting verður nýtt, tá ætlanin er at endurútflyta vørurnar. Tá vørur til virkna góðsking verða innfluttar undir fyribils fráseting, sleppur innflytarin undan at gjalda punktgjald, toll og mvg av teimum.

Fyribils fráseting kann eisini nýtast, tá talan er um vørur til góðsking, sum loyvi annars ikki er at innflyta ella útflyta.

Tá ið fyribils fráseting verður nýtt, skal hvørki innflutningsloyvi ella upprunaprógv vísast fram, tá vørurnar verða innfluttar. Hinvegin skal støða takast til um hóskandi trygd, t.d. bankatrygd, skal setast fyri, at tollur og mvg kunnu verða goldin. Um trygd verður sett, eigur hon at verða leysgivin, tá loyvishavarin skjalprógvar fyri tollvaldinum, at vørurnar eru nýttar at framleiða aðrar vørur við, sum annahvørt eru útfluttar ella farnar í fríhavn ella á frígoymslu.

Møguleiki er at seta vørur innfluttar til góðsking ella lidnar vørur í fría sølu. Tá skal loyvishavarin tó vátta, at tað ikki hevur borið til at útflyta vørurnar sum ætlað.

Tann, sum ynskir at fara undir virkna góðsking, skal fáa sær loyvi frá tollvaldinum. Neyðugt verður at gera reglur um, hvat umsóknin skal innihalda, og um hvørji skjøl skulu fylgja við. Reglur mugu eisini gerast um, hvørjar treytir skulu vera loknar, fyri at umsøkjarin kann fáa loyvið.

Loyvishavarin skal føra neyvan roknskap yvir rávøru, nýtslu og úrslit, bæði høvuðsúrslit og síðuúrslit og útflutning.

Tollvaldið má gera sær innanhýsis reglur um ymsar freistir fyri ymisk sløg av vørum, og roknskaparreglur fyri frígoymslur. Í reglunum skal dentur verða lagdur á at upplýsa í stovningarfasuni og ikki at upplýsa leypandi frammanundan hvørjum innflutningi og útflutningi.

# 3. Lógarreglur / skrivligar vegleiðingar

## 3.1. lógir

(Sí síðu 6 og 7 pkt. 2.1) Broyting eigur at vera gjørd í løgtingslóg um toll, ið m.a. ásetur:

- at fríhavn er avbyrgt havnarøki undir eftirliti av tollvaldinum og undir reglum um tolleftirlit
- at fríhavn, hvat tolli, avgjaldi og mvg viðvíkur, er at meta sum útland
- at, um vørur verða fluttar úr fríhavn inn í Føroyar, skulu tollur og avgjald rindast
- at bæði fríhavnsmørk og fríhavnsøkir eru undir tollvaldsins eftirliti
- hvat tollvaldið hevur loyvi at kanna
- at eigarin av fríhavnini fyri einki skal gera og viðlíkahalda girðing um fríhavnina/fríøkið og geva tollvaldinum høli at hava eftirlit í
- hvørjar vørur kunnu goymast í fríhavn, og hvat er galdandi fyri vørur, meðan tær eru í fríhavn
- heimildir til Føroya Landsstýri at áseta aðrar reglur
- hvat annað virksemi skal kunna rekast í fríhavnini/á fríøkinum
- hvør kann stovna frígoymslu, og hvar, við loyvi frá tollvaldinum
- hvørjar treytir skulu vera loknar, fyri at loyvi verður givið.

Harumframt eigur ein lóg at verða gjørd, sum ásetur reglur galdandi fyri fríhavnir/fríøkir í øllum førum.

## 3.2. Skrivligar vegleiðingar

Neyðugt verður at gera standard reglugerðir, loyvir og umsóknarbløð til alment pakkhús og til privat pakkhús. Tey, sum seta á stovn fríhavn / fríøki / frígoymslu, mugu sjálv marknaðarføra fríhavnina / frígoymsluna við teimum tænastum, ið har kunnu fáast.

Tollvaldið eigur harumframt at gera sær innanhýsis reglur at nýta, tá farið verður í fríhavnina ella á frígoymsluna at kanna við stakroyndum, um reglurnar verða yvirhildnar.

# 4. Yvirlit yvir íløgur

Verandi íløgur eiga at verða nýttar, og endamálið við at seta fríhavn v.m. á stovn eigur eisini at vera at fáa mest møguligt burtur úr gjørdum íløgum. Tað merkir, at tey hús og bygningar, sum í dag standa tóm, kunnu verða tikin í nýtslu til goymslur.

Mett verður, at best er, um økið verður girt, og um tollvakt er við portrið. Sostatt er bert kostnaður fyri hegn, portur og tollvakt.

Skotið verður upp, at portrið og girðingin um økið sum aðrar havnaíløgur verða goldin av kommununi, at tollvaldið ber kostnaðin av tollvaktini, og at virkini í havnini bera kostnaðin av amboðum, útgerð og bygningum.

Um nakar setur frígoymslu fyri almenningin á stovn uttan fyri fríhavnina, eigur viðkomandi sjálvur at bera allan kostnað.

# 5. Niðurstøða

Nevndin mælir til, at tey sum søkja um at seta á stovn fríhavn / fríøki / frígoymslu, og sum lúka tær treytir, ið lógir og kunngerðir áseta, fáa loyvi til at stovna tað tey ynskja. Soleiðis verður ikki bert ein fríhavn / fríøki / frígoymsla, men fleiri, og á tann hátt metir nevndin, at mest fæst burtur úr verandi íløgum, og at flest fáa gleði av fríhavnunum.

Í fyrstu atløgu koma kanska ikki nógvar nýggjar vinnur, um fríhavnir verða settar á stovn, men fríhavnir koma í stóran mun at hjálpa verandi vinnuni at mennast og styrkna.

## 5.1. Verandi vinna

Ein tann størsti trupulleikin føroysk vinnuvirkir hava í dag er likviditetur til rakstur og innkeyp av rávøru.

Tann fjarstøða, ið er til aðrar marknaðir, bæði tá talan er um at innflyta og at útflyta, førir m.a. við sær, at føroysk ídnaðarvirkir, hvørs týdningar-miklasti kappingarfaktorur er stuttar leveringstíðir á heimamarknaðinum, oftast liggja við eini lutfalsliga stórari goymslu í mun til kappingarneytar á meginlandinum, ið kunnu fáa rávøru dag frá degi.

Føroysk virkir eru smá samanborin við kappingarneytarnar í útlondum og verða ofta noydd at gera óneyguða stór innkeyp í mun til virksemi teirra fyri at fáa vøruna fyri ein nýtiligan prís.

Við atliti til at føroyskum vinnuvirkjum sum heild vantar gjaldføri, má sigast, at vørugoymsla bindir ein ræ ttiliga stóran part av gjaldførinum, ið kundi verið nýttur til annað virksemi innan virkiskarmarnar, eitt nú marknaðarføring, menning o.a.

Við fríhavnum í Føroyum, verður latið upp fyri nøkrum møguleikum at gagnnýta eitt aktivt innkeypsmynstur, ið lættir um gjaldføristørvin hjá innflutnings- og framleiðslufyritøkum, ið innflyta rávøru ella lutir til framleiðslu teirra.

Í mun til at kravið í dag er, at sendingar verða tollavgreiddar í einum, fær innflutningsvinnan við fríhavnum møguleikan at partklarera, tað merkir, at útflýggjanin kann fara fram í smærri eindum, tillagað dagliga tørvinum.

Hetta betrar um gjaldførið hjá innflytaranum í samband við, at meirvirðisgjald, tollur o.a. ikki fellur til gjaldingar, fyrr enn vøran skal í umfar, annaðhvørt í framleiðslu ella sølu.

Í samband við kontraktkeyp (tað er, at føroyskur innflytari bindur seg til at keypa eina ávísa nøgd av vøru frá einum útlendskum leverandøri, leverað yvir eitt ávíst tíðarskeið) er vanligt, at vøran verður goymd í pakkhúsum uttanlands og leverað hagani í størri sendingum.

Við fríhavnum verður møguleiki at leggja vøruna upp í Føroyum í navninum hjá seljaranum, uttan at hon í veruleikanum er innflutt.

Vøran kann síðani partklarerast, sum greitt er frá omanfyri, tó í nógv minni eindum, enn talan er um í dag. Samstundis kann vøran ómakaleyst takast aftur, býtast um við aðra, ella verða seld til onnur øki uttan fyri Føroyar.

Tann føroyski innflytarin fær saman við einum munandi bata í gjaldførinum, nýggjar og smidligari samvinnumøguleikar, vit ikki kenna til í dag. T.d. kann talan vera um rávøru og lutir til ídnaðarframleiðslu, byggitilfar osfr.

Flestu ídnaðarfyritøkur berjast dagliga við trupulleikan í svingandi rávøruprísum. Tað er ein sera týdningarmikil faktorur í framleiðsluni, at innkeyp fer fram í rætta tíðspunkti og til tann rætta prísin. Fríhavnir lata upp fyri møguleikanum at føra ein meira aktivan innkeypspolitik enn í dag. Virkir kunnu hava goymslu í fríhavnunum, partklarera, sum nevnt omanfyri, og leggja afturat goymsluni, so hvørt sum rávøruprísurin er á einum gagnligum støði.

Hóast ein slík innkeypsskipan setur størri krøv til gjaldførið, tí vørugoymslan sum heild verður stór, so gevur hetta ein møguleika at keypa bíligt og harvið betra um kappingarførið.

Ein skipan av tílíkum slag er dýrari at reka uttan møguleikarnar, ið eru við fríhavnum, við tað at tollur og avgjøld fella til gjaldingar, beinanvegin vøran kemur til landið.

Tí má metast, at fríhavnir í hesum sambandi førka kappingarførið hjá ídnaði okkara eitt vet tann rætta vegin.

## 5.2. Nýggjar vinnur

### 5.2.1. Tænastu- og flutningsvinnan

Nakað av góðsi verður í dag umskipað í Føroyum til víðariflutning til og frá skandinavnisku londunum, Hetlandi, Skotlandi og Íslandi. Fríhavnsgoymslur stuðla hesum virksemi og víðka møguleikarnar fyri at økja um flutningsnøgdirnar og tað virksemi, sum stendst av tí í flutnings-, "stevedore"- og tænastuvinnuni annars.

### 5.2.2. Havnaverkini

Havnaverkini eru væl útbygd, men tey eru bundin av stirvnum reglugerðum í ásetanini av tænastugjøldum teirra. Ein marknaðarorienterað hugsan á hesum øki hevði ikki einans økt um kappingarførið hjá vinnunum í havnunum, men eisini hjá havnunum sjálvum.

### 5.2.3. Umskipan av fiski

Sum víst á í álitinum: "Føroyar - eitt ressursucenter", sum samstarvsnevndin fyri almennar stovnar og vinnulív legði fram í mars 1993, er rávørutilfeingið í Norðuratlantshavi umleið 1. mió. tons, og av tí verða bert 6% uppskipað her.

Umleið 1% av somu nøgd verður umskipað á føroyskum fjarðum til víðari flutning.

Avgerandi fyri, hvar umskipan og goymsla av hesum fiski fer fram, er kappingarførið hjá teimum, sum bjóða seg fram til slíka tænastu, og vit vita av royndum, at tað ber til, hjá føroyskum virkjum at luttaka í hesum virksemi.

Russisk skip hava í fleiri ár nýtt føroyskar havnir til umskipan, eins og grønlendsk, hetlendsk og íslendsk skip við jøvnum millumbili leggja teirra veiðu upp her.

Tí hava vit góðar grundir at rokna við, at hetta virksemi kann økjast, um hesum skipum verður boðin ein enn betur tænasta enn í dag.

Tey russisku skipini, t.d., leggja ikki at landi, tá tey umskipa teirra fisk. Orsøkirnar eru, at tey á tann hátt spara havnapening og vørugjald, og at manningin tá sjálv sleppur at standa fyri arbeiðinum.

Vilja vit hava tey at gera hetta arbeiði í landi, verður helst neyðugt at slaka í teimum reglubundnu gjaldsásetingum hjá havnunum, eins og vanliga fatanin av, hvør hevur rættin til arbeiði í føroyskum havnum, eigur at laga seg eftir teimum treytum, marknaðurin setur.

Í fyrstu atløgu kemur tí kanska ikki so nógv burturúr at lækka gjøldini, men talið av skipum í havnunum økist, og hetta vil í aðru atløu føra til at virksemið í Føroyum økist.

Í hvussu so er verður einki mist. Leggja skipini til bryggju, ber til at rokna við, at okkurt liggur eftir tey. Manningin sleppur í land og er tá eins góðir turistar og onnur. Onkrar umvælingar verða gjørdar her, tí tað liggur best fyri, og tað fer at loysa seg hjá teimum at leggja partar av lastini upp her til goymslu, sølu ella endurferming.

At laga gjøldini fyri transitgóðs eftir kappingini uttan at avlaga gjaldsskipanina annars ber til í einum avmarkaðum øki, sum fríhavnir eru, og eigur tí at verða álagt kommununum.

Gjøldini, ið talan er um, eru brúgva-, havna- og vørugjald.

## 5.3. Handilsdepil

Fríhavnir í føroyskum øki kunnu vera ein týdningarmikil fortreyt fyri at menna marknaðin hjá føroyskum vinnulívi í grannalondunum.

Føroyar liggja væl fyri at vera ein slíkur depil fyri partar úr útflutninginum úr Europa til norðuratlantisku londini, og vit hava dømi um, at føroyskar handilsfyritøkur longu nú hava víðkað teirra virksemi til grannalondini, eins og vit hava dømi um, at útlendskar fyritøkur nýta Føroyar sum umskipingardepil, tá tær selja vørur í grannalondunum.

## 5.4. Annað virksemi í fríhavn - oljuvinna

Skulu vit gera okkum nakrar vónir um at flyta ein part av tí virksemi, sum í dag fer fram í skotsku og norsku oljuhavnunum, mugu treytirnar her vera eins góðar.

Fleiri av verandi føroysku havnunum hava her ein menningamøguleika, har loyvi til at skipa partar av havnini sum fríhavnsøki er ein neyðug fortreyt.

25/10-94

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er:

at gera eina frágreiðing um, hvussu ein fríhavn í høvuðsheitum virkar,

at greina út, hvørjar lógarreglur, herundir eisini hvørjar kunngerðir, neyðugt verður at gera fyri at seta fríhavn á stovn í Føroyum,

at greina út hvørjar skrivligar vegleiðingar neyðugt verður at gera til brúkarar av fríhavn,

at gera eitt yvirlit yvir, hvørjar íløgur neyðugt verður at gera, og meta um, hvat hesar koma at kosta, og hvør skal bera kostnaðin,

at gera eina frágreiðing um, hvussu ein fríhavn skal rekast, herundir hvørjar trygdarreglur skulu vera galdandi. Meting skal eisini gerast av, hvat raksturin kemur at kosta, eins og tilmæli skal vera um, hvør skal standa fyri rakstrinum, og hvør skal bera rakstrarkostnaðin,

at gera eitt yvirlit yvir, hvørjar itøkiligar fyrimunir verandi vinna í Føroyum fær av eini fríhavn,

at gera eina meting av møguleikunum fyri at fáa nýggjar vinnur til Føroya, um fríhavnir verða skipaðar her.

Bólkurin skal herumframt kanna, um nøkur alternativ eru til fríhavn. Her verður eisini hugsað um møguleikarnar í grein ~~9~~ í §12 tolllógini.